## Danir fyri evruni

Skuldu danir nú tikið støðu til at fáa sær evruna til gjaldoyra ístaðin fyri krónuna, hevði ein lítil meiriluti atkvøtt fyri evruni. Tað er úrslitið av einari kanning hjá donsku hagstovuni og Danske Bank. Har siga 39,4 prosent, at tey høvdu heilt vist atkvøtt ja, og 41,0 prosent eru líka sannførd um, at tey høvdu sagt nei. 12 prosent ivast, men halda, at tey høvdu atkvøtt ja, meðan onnur 6,4 prosent av teimum ivandi siga, at tey høvdu helst sagt nei. Við hesum tølunum kemur kanningin til ta niðurstøðu, at evruviðhaldsfólkini eru 4,6 prosentstig frammanfyri, sigur Danske Bank.



## Stór vindmylluætlan

Amerikanska orkufelagið General Electric kunngjørdi í vikuni, at tað ætlar sær at byggja eina granskingar- og tøknimiðstøð í Oslo, har granskarar og onnur skulu leggja seg eftir at menna vindmyllur á sjónum. Í sama viðfangi ætlar fyritøkan at gera eina royndarstøð í Nord-Trøndelag. Ætlanin hjá General Electric hevur fingið sera góða móttøku millum norskar politikarar, og tað var ikki av tilvild, at ráðharrarnir Trond Giske (myndin) og Terje Riis-Johansen sótu við borðið, tá amerikanska felagið kunngjørdi sína ætlan.

# Kaotiskir fríggjadagar lata Rúsuna upp leygardag

**Kaotiskt innkeyp við langum bíðirøðum fríggjadag seinnapart hevur nú fingið landsstýrismannin í vinnumálum, Johan Dahl, at broyta eina kunngerð soleiðis, at Rúsdrekkasøla Landsins eisini fer at hava opið leygardagar**

EINKARSØLAN
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

- Tann, sum hevur gjørt nýtslu av Rúsuni og handlað í Rúsuni ein fríggjadag seinnapart, hevur sæð eina rímiliga kaotiska støðu í teimum flestu handlunum hjá Rúsuni í landinum, og fyri at fólk skal hava møguleika fyr iat handla eins væl har, sum aðrastaðni, so hava vit gjørt av, at lata hana verða opna frá leygardag frá 10 til 16.

Tað sigur Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum um orsøkina til, at hann nú hevur broytt kunngerðina um Rúsdrekkasølu Landsins soleiðis, at tað nú verður gjørligt hjá Rúsuni at hava opið leygardag eisini.

### Sama sum aðrastaðni

Áðrenn landsstýrismaðurin broytti kunngerðina, hevði hann ætlaðu broytingarnar til hoyringar hjá Fólkaheilsuráðnum.

Fólkaheilsuráðið heldur tað verða rímiligt, at einkarsølurnar í landinum fylgja teimum vanligu handilstíðunum, og at rúsdrekkaeinkarsølurnar í hinum norðurlondunum eisini hava opið leygardagar.

- Ráðið heldur eisini, at tann gravgangur, sum sæst í einkarsølunum fríggjadagar seinnapart, tá fólk koma úr arbeiði, er lítið virðiligur, sigur Fólkaheilsuráðið í sínum viðmerkingum.

Sostatt er Fólkaheilsuráðið samt við landsstýrismanninum í grundgevingunum fyri at lata Rúsna hava opna leygardagar eisini.

### Snýr seg ikki um pengar

Landsstýrismaðurin í Vinnumálum heldur fast við, at tað er ikki ein spurningur um at selja meira og forvinna meira pening, at rúsdrekkasølurnar sleppa at hava opið seks tímar meira um vikuna, heldur ikki at talan er um eina betring í atkomumøguleikunum.

Spurdur, um hann ikki heldur tað verða ein møguleika at nøkur fara at keypa leygardag, sum annars ikki høvdu keypt, um Rúsan ikki var opin leygardag, sigur Johan Dahl.

- Tey fólkini, sum hava hug at drekka, og drekka ein leygardag ella eitt vikuskifti, tey fara væl eisini at keypa sær tað, tey hava tørv á eitt fríggjakvøld, og drekka tað so leygardag, so tað er eingin broyting í tí. Tað, sum er vesintligt haldi eg, tað er at fólk hava møguleikan, eins og øll onnur, sum handla, at tey kunnu keypa sær eina vínfløsku ella ein kassa av øl leygardag, eins væl og ein fríggjadag, ístaðin fyri at standa samanstúvaði eins og sild í tunnu í kø, fyri at naá, aftaná arbeiðstíð, at keypa sær tað, tey hava brúk fyri. Eg haldi ikki at tað er serliga virðiligt fyri nakran, sigur Johan Dahl.



*Nú verður lættari hjá fólki at leggja sær sítt innkeyp í Rúsuni til rættis. Nú er nevniliga latið upp fyri møguleikanum at lata dyrnar upp leygardag eisini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Royndir úr Svøríki vísa meirsølu

Fólkaheilsuráðið sigur hinvegin í sínum viðmerkingum, at royndirnar úr Svøríki, har tey eisini hava einkarsølu av rúsdrekka, eru, at tá ið upplatingartíðirnar hjá monopolinum vórðu víðkaðar, vaks rúsdrekkasølan.

Johan Dahl sigur, at tíðin vil vísa, um Rúsdrekkasøla Landsins fer at vinna meira pening aftaná hesa broytingina.

- Men tað er so ikki endamálið við tí. Endamálið er tað, at mann gevur fólki ein betri møguleika fyri at kunna leggja sær dagin til rættis, eisini tá tað snýr seg um at keypa inn øl og spiritus. Tað eru vaksin fólk, vit hava við at gera, hetta eru jú menniskju yvir 18 ár, sum stýra sínum egna lívi, staðfestir Johan Dahl.

Landsstýrismaðurin ivast ikki í, at Rúsdrekkasølan og hennara fólk gera eitt munagott arbeiði, tá tað snýr seg um at kunna fólk um vandarnar við alkoholi og til at betra um dryggjuvanarnar hjá fólki, og leggur afturat, at sølan seinastu árini vísir á sunnari drykkjuvanar hjá fólki, við at minni av sterkum alkoholisku drykkjum er selt, og at meira verður selt av veikara slagnum.

> *Ráðið heldur eisini, at tann gravgangur, sum sæst í einkarsølunum fríggjadagar seinnapart, tá fólk koma úr arbeiði, er lítið virðiligur*
>
> *- Fólkaheilsuráðið*

## Prísurin má upp

**Fólkaheilsuráðið heldur, at verður upplatingartíðin hjá Rúsuni broytt, og atkomumøguleikarnir til rúsdrekka betri, so má prísurin upp fyri at tálma nýtsluni**

EINKARSØLA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Fólkaheilsuráðið sigur í sínum viðmerkingum til uppskotið hjá Johan Dahl, landsstýrismanni í Vinnumálum, um at loyva Rúsdrekkasølu Landsins eisini at hava opið leygardagar frá klokkan 10 til 16, at tað hevur ofta víst á, at vit hava bert atkomiligheit, prís og hugburð at regulera nýtsluna við.

- Nýtslan táttar nú í sjey litrar av reinum alkoholi uppá fólkið árliga. Hetta merkir, at um so skuldi verið, at víðkaða handilstíðin hevur vøkstur í nýtsluni við sær, so má Rúsdrekkasølan vera til reiðar at hækka prísin, sigur Fólkaheilsuráðið.

### Rúsan viðgerast sum apotek

Fólkaheilsuráðið heldur eisini, at tað er púra óviðkomandi í hesum málu, hvussu nógv Rúsdrekkasølan skal hava í yvirskoti.

- Rúsdrekkasøla Landsins er at rokna sum apotekini í Føroyum, eitt veitingarstað av serligari vøru, sum ikki er at rokna sum vanlig handilsvøra, men hinvegin ein vøra, sum hevur møguligan stóran skaðavirkning upp á einstaklingar og samfelag, staðfestir Fólkaheilsuráðið, og mælir til, at hetta er tað grundleggjandi sjónarmiðið, sum tey mæla til, verður lagt til grund í viðgerðini av viðurskiftum Rúsdrekkasølu Landsins framyvir.